# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mikudagin 26. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00306**<br>**Umbøn um ummæli í samband við umsókn um sundurbýti á matr. nr. 6 í Syðrugøtu**<br>Ynski er at býta matrikul nr. 6 í tveir partar, men 2 gyllin skulu framvegis verða heft at 6A har hús nr. 28 standa, tað er Úti í Bø 28.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umsøkjari kann fremja sundurbýti av matr. nr. 6 Úti í Bø í Syðrugøtu sambært umsókn. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 2. | **16/00241**<br>**Reglugerð fyri ígongdsetarastuðul**<br>Vinnunevndin samtykti á fundi 25. August 2016, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.<br><br>Umsitingin hevur rætta upplegg til reglugerð um ígongdsetarastuðul. Uppleggið hevur nakrar broytingar s.s. at stuðulin er hækkaður frá 5.000 kr. til 10.000 kr, og at íløgufeløg ikki kunnu fáa stuðul.<br><br>Lagt verður eisini upp til, at mannagongdin verður tann, at felagið útfyllir standardumsókn á www.eystur.fo, og at Vinnunevndin góðkennir umsóknina, eins og Mentanarnevndin góðkennir umsóknir um stuðul til mentan.<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við mannagongdini og dagførda upplegginum (22.09.2016) til ígongdsetarastuðul.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini. |
| 3. | **16/00285**<br>**Tilboð um keyp av mtr. nr. 28e og 28d í Norðragøtu**<br>Eysturkommuna hevur móttikið áheitan um keyp av jørð við ástandandi húsi á Oyrini í Norðragøtu, økið er útlagt sum Miðstaðarøki.<br><br>Umsitingin mælir til at kommunan ognar sær jørðina við ástandi húsum, tí at jørðin er Mistaðarøki og kommunan kannar sær fyrimunir ið kunnu verða av | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.<br><br>*Emma Rasmussen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Býráðsfundur mikudagin 26. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

økinum.

Upphæddin fyri møguligt keyp av jørðini við ástandandi húsum kann verða tikin av konta nr. 6.22.11.510 Byggibúning bústaðir (Løgujáttan).

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til atkommunan ognar sær jørðina við ástandandi húsi.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum.*

**4.** **13/00078**

**Bussteðgipláss úti á Kráartanga í Leirvík**

Nú nýggj gøta er gjørd frá minnisvarðanum og oman til neystini, er málið um busslumman á Kráartanga aktuelt aftur. Uppskot er um at fáa busslummar og bussskýlini gjørt nú og fíggja arbeiði av konto 6.22.11.510 byggibúning (løgujáttan).

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka fund við Landsverk um hetta málið og onnur mál fram við landsvegnum sum ikki eru avgreidd.

Fíggjarnevndin mælir til at bussteðgiplássi verður gjørt nú og at peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510 byggibúning (løgujáttan).

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá og fíggjarnevndini.

**5.** **16/00290**

**Uppskot til Multihøll í Eysturkommunu**

Uppskot frá Árna Jacobsen um at gera multihøll í Eysturkommunu, við at inniloka fótbóltsvøllin í Leirvík. Hann mælir til at býráðið samtykkir at gera meira nágreiniligari kanningar og kostnaðarmetingar, og gera eitt ítøkiligt projekt av hesi verkætlan.

Umsitingin hevur gjørt ávíst tilfarkanningar av eini høll. Fyri at koma víðari við einari verkætlan á hesari støðd, verður mælt til, at gera eina ítøkiliga kanning og kostnaðarmeting av at byggja eina multihøll Uppi á Brekkum í Leirvík. Umsitingin mælir til at kanning og kostnaðarmeting skal gerast av/saman við einum av stóru byggifyritøkunum í Føroyum.

Málið er viðgjørt í øllum føstu nevndunum og tilmælini eru soleiðis:

Hanna Jensen setti fram broytingar uppskot og skjýtur upp at ein tørvslýsing verður gjørd. At peningurin til kanningar og kostnaðarmetingar verður settur av í fíggjarætlanini fyri 2017, og at endaliga avgerðin um multihøll verður útsett til komandi býráð at taka støðu til.

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Hannu Jensen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Hanna Jensen, Oluffa Joensen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Tollakur Joensen.

**Býráðsfundur mikudagin 26. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Mentanarnevndin:**
Mentanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. Mentanarnevndin mælir eisini til, at býráðið fær kostnaðarmeting av fleiri variantum av høllum.T.d. hvat er bíligasta loysn, hvat kostar høll við nýggjum skiftingarrúmum og hvat kostar høll við rennibreyt á langsíðunum.

**Vinnunevndin:**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. Vinnunevndin mælir samstundis til, at umsitingin kannar hvat projekteringin kostar, hvørjir fíggingarmøguleikar eru og at ein tørvslýsing verður gjørd.

**Trivnaðarnevndin**
Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini og at ein møgulig tørvlýsing verður gjørd. Eisini verður mælt til, at ein rakstrarætlan verður gjørd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin:**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umsitingin ger eina tørvslýsing í mun til multihøllina og kannar møguligar fíggingarmøguleikar til býráðið, áðrenn samband verður tikið við aðrar partar um fígging, kostna v.m.

**Fíggjarnevndin:**
Jóhan Christiansen mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Hjalti Dalheim mælir til at málið verður nærri lýst/avklárað av býráðslimunum , og at neyðugur peningur verður avsettur á fíggjarætlanini fyri 2017.

Brandur Jacobsen tekur støðu til máli á býráðsfundinum.

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Árni Jacobsen, við hesi viðmerking:
*”Vit meta at besta og bíligasta loysnin er at inniloka verandi vøll i Leirvík, og neyðugt er at fáa gjørt eina verkætlan av høllini við nágreiniligum kostnaðarmetingum og uppskotum til loysnir til byggingina.”*

Sostatt er broytingaruppskotið hjá Hannu Jensen samtykt.

**6.** **16/00315**
**1.viðgerð av Fíggjarætlan 2017**
Uppskot frá fíggjarnevndini fyriliggur.

Einmælt samtykt at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

## Býráðsfundur mikudagin 26. september 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

## Fundurin lokin kl. 23.00

**7.** **16/00273**

**Umsókn um eftirgeving av skattaeftirstøðu**
Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um eftirgeving av skattaeftirstøðu hjá borgara.

Umsitingin mælir frá at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________